# Tendrið eitt ljós í myrkrinum




AMNESTY INTERNATIONAL
*Tíðindaskriv*

Mánadagin 10. desember er altjóða mannarættindadagur. Tá heitir Amnesty International á fólk um at tendra eitt ljós í vindeyganum fyri teimum, sum sita í fongsli orsakað av teirra kyni, húðaliti, trúgv ella politisku sannføring. Tað eru fólk, sum hvørki hava nýtt ella eggja til harðskap. Amnesty rópar hesi fólk samvitskufangar.

Í sambandi við mannarættindadagin fara fólk frá Amnesty at selja ljós og postkort á Torginum í SMS og í Keypsamtøkuni í Hoyvík fríggjadagin 7. og leygardagin 8. desember. Í Klaksvík eru ljós at fáa í Innkast. Til ber eisini at bíleggja ljós frá skrivstovuni hjá Amnesty.

Amnesty heitir eisini á fólk um at senda stuðulsheilsanir til tvær kvinnur, Eren Keskin í Turkalandi og Rebiya Kadeer í Kina. Tilfarið, sum verður latið saman við ljósunum, er eisini at finna á heimasíðuni www.amnesty.fo undir Nýtt.

### Tíðindabrøv við telduposti

Í næstum fer nevndin í Amnesty undir nýtt kunningartiltak. Ætlanin er at senda limum og øðrum áhugaðum tíðindir við telduposti. Um tú kundi hugsað tær at fingið tíðindir frá Amnesty, kanst tú senda okkum ein teldupost á amnesty@amnesty.fo. Tíðindini kunnu sjálvandi eisini sendast við vanligum posti, um onkur ynskir tað.

Amnesty International
Føroya Deild
www.amnesty.fo

## VIÐMERKINGAR

# Flogvøllurin – ofraður á fullveldisaltarinum

**Sune Jacobsen**



Í síðstu viku var tingmanningin hjá Fólkaflokkinum á gosi um valúrslitið í Vágum. Tingmaðurin hjá flokkinum í Vágum sigur bart út, at tað skjótt er skomm at vera vágamaður. Og fyri at stoyta salt í sárið endar blaðið við hesum, sum kanska er skemt, men eisini kann skiljast sum nakað av sannkeika:

**Uppskot um at revsa vágaveljarar:**
**Fyll sjógv í holið og flyt flogvøllin á Glyvursnes.**

### Valið í 1998

Fyri síðsta løgtingsval sendu Jørgen Niclasen og undirritaði í felag skriv út, har vit greiddu veljarunum frá, hvussu langt undirsjóvar- og flogvallarmálið var komið. Um flogvøllin søgdu vit okkara veljarum: Í flogvallarmálinum hevur landsstýrið boðað danska ferðslumálaráðharranum frá, at landsstýrið ynskir at útbyggja flogvøllin í Vágum og vil hava samráðingar um hetta sum skjótast. Løgmaður hevur í skrivi heitt á ferðslumálaráðharran um at fremja nevndu útbygging og hevur bjóðað honum til Føroya at greiða málið endaliga. Hetta vóru orðini, skrivað av okkum báðum á vári fyri løgtingsvalið. Eingin ivaðist í, hvør skuldi útbyggja vøllin, tí málsøkið var danskt, og sostatt høvdu danir skyldu at halda vøllin á hóskandi støði.

### Samgonguskjalið

Men málið skuldi fáa eina aðra vend. Tað vistu tey flestu longu í 1998, tá samgonguskjalið hjá sitandi samgongu varð almannakunngjørt. Har varð sagt, at øll mál skuldu yvirtakast, men um vit ikki høvdu førleika, so kundu ávís mál leggjast út til onnur at umsita, til vit høvdu tann neyðuga førleikan.

Í somu løtu hetta varð kunngjørt, vistu tey, sum hava áhuga fyri flogvallarmálinum, at útbyggingar hendu ongar, tí hví skuldu danir farið at útbygt nakað, sum hendan samgongan hevur avgjørt at yvirtaka.Skaðin var hendur, og tað hava tey flestu vitað alt hetta valskeiðið.

### Næsti brølarin

Ein tann fyrsta uttanlandsferðin hjá sitandi samgongu var at fara niður at samráðast við donsku stjórnina um uttanlandsskuldina. Úrslitið varð sum væntað gott. Stjórnin vildu strika 900 mió.kr umframt at leggja 500 mió. kr á ís í fyrstu atløgu. Í ovfarakæti fara løgmaður og landsstýrismenn út í danskar og føroyskar fjølmiðlar at rósa sær sjálvum fyri ótrúlig samráðingarevni. Ja, her hevði David næstan vunnið á Goliat. Tveir dagar seinni situr Finnbogi Arge, sum tá umsat samferðslu, á fundi við danska ráðharran Sonju Mikkelsen um flogvallarútbyggingina.

Hvat tey hava tosað um, vita vit ikki, men tað er ikki óhugsandi, at S.M.hevur smílt. Her kemur tú at biðja um 200 mió kr til at útbyggja eitt málsøki, sum tit sjálvir hava sagt, at tit skulu yvirtaka. Og rómurin um tær 1.5 mia.kr, sum vit strikaðu í síðstu viku, hevur ikki lagt seg. Nej, ved du nu hvad Finnbogi……..

### Ongar útbyggingarætlanir

Men henda samgongan hevur ongantíð havt nakrar ætlanir um at útbyggja flogvøllin. Í vár var undirritaði nakrar dagar á tingi, og setti eg tá løgmanni munnligan fyrispurning um, hvussu flogvøllurin var raðfestur á langtíðarfíggjarætlanini hjá landsstýrinum Har var eingin króna avsett, og er tað ikki enn. Um eitt gott ár verður koyrandi um Vestmannasund. Heldur ikki her er ein króna avsett til parkeringsøkið á flogvøllinum, og tað hevur altíð verið føroyskt málsøki. Her hjálpir eingin góða mamma ella danski staturin.

### Magni Arge

Nú vita vit at samgongan hevur slept flogvøllinum. Tað hevur løgmaður boðað frá alment. Hann smyr egnan ódugnaskap upp á flogvallarovastan í Vágum, tí hesin hevur sagt, at fullveldisætlanin steðgaði allari útbygging. Tað vil eg halda, at øll uttan løgmaður og hansara floksfelagar hava vitað síðani 1998. Men hvat er tað sum hendir við tyrluflúgvingini? Er tað skemtið í Dagblaðnum um at flyta á Glyvursnes, sum er við at byrja?

Í bløðunum í síðstu viku sigur Magni Arge, at veðrið í Vágum í august hevði tarnað tyrluflúgvingini, men hann hevði boðað operatørunum Statoil, BP og Amarada Hess frá, at Atlantsflog hevur í hyggju at syrgja fyri, at tyrlupallurin í Havn eisini verður førur fyri at taka ímóti hesum slagi av flúgving. Tað skal millum annað gerast á tann hátt, at neyðug útgerð verður sett upp í Havn, so tyrlurnar fáa møguleikan at flúgva inn eftir Nólsoyarfirði við sonevndari instrument-flúgving.

Er henda ætlan góðkend av samgonguni ella landsstýrinum, tí eitt er, at samgongan sleppur flogvøllinum- annað er, at hon eisini er við at sleppa tyrluflúgvingini.

# ítróttur

Nr. 236 • hósdagur • 6. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sama søgan



*Heini Fernandez, sum her sæst í dysti móti Brøndby, var í seinna hálvleiki nær við at skora, men royndin varð í evstu løtu bjargað á málstrikuni*

**Einsd og í heimadystinum mátti FCK taka til takkar við teprum tapi móti Borussia Dortmund**

UEFA-CUP
*Jákup Mørk*

UEFA-Cup ævintýrið hjá FCK er av á hesum sinni. Hetta varð staðfest á einum fullsettum Westfalen Stadion í Dortmund týskvøldið, tá heimaliðið vann seinna dystin móti FCK við einum máli móti ongum.

Hetta var eisini úrslitið í fyrra dystinum, og eins og ta ferðina var tað eitt mál í seinastu minuttuunm, sum gjørdi av við donsku meistararnar.

### Høvdu tak á

Orsakað av tapinum á heimavølli, so visti FCK, at teir í øllum førum máttu hava mál, um teir skuldu koma víðari. Frá fyrsta bríksli royndu teir eisini at leggja trýst á, og tað var eisini heilt nær við, at okkurt spurdist burturúr.

Í fyrra hálvleiki átti Thomas Røll størsta møguleikan, tá hann eftir uppspæl frá Sibusiso Zuma smekkaði til á stongina, og í seinna hálvleiki noyddist týskur verjuleikari at bjarga á sjálvari málstrikuni, eftir at Heine Fernandez hevði roynt seg.

FCK trýsti helt fram, men sum dysturin leið, so tóktist tað alt meira sannlíkt, at royndirnar ikki skuldu geva úrslit, og beint fyri leiklok slerdi heimaliðið so sigurin fastan.

Í fyrstu atløgu stórbjargaði Magnus Kihlstedt týskari roynd, men bólturin støkk til ein púra leysan Jan Derek Sørensen, sum uttan stórvegis himpr avgjørdi dystin.

### Økt kvota

Við tapinum er nú greitt, at europeiska royndin hjá FCK er av á hesum sinni. Hóast teir ivaleyst munnu iðra seg um, at teir ikki megnaðu at avgera teir báðar dystirnar móti Dortmund, so skerst ikki burtur, at avrikið hesaferð hevur verið betri, enn tað vanliga hevur verið hjá donsku liðunum seinnu árini.

FCK hevur í heyst vunnið ein dyst móti Lazio og sligið Ajax Amsterdam úr kappingini, so nøkur stig eru hóast alt komin á kontina hjá donskum liðum, sum annars hevur verið niðurgangandi seinnu árini. Heldur ikki skal gloymast, at Brøndby í kvøld hevur møguleika at økja um stigakvotna, tá teir taka ímóti italska Parma. Fyrri dysturin í Parma endaði við javnleiki, 1-1.

Annars verður danska heystarhálvan rundað av nú sunnudagin, og absolutti stórdysturin hesa ferð verður á Brøndby Stadion, har Brøndby og FCK bresta saman. Ein dystur, sum í roynd og veru kann avgera meistaraheitið, um heimaliðið vinnur, men sum hinvegin letur alt standa púrasta opið, um FCK fer avstað við teimum trimum stigunum.

# Liðkappingin er byrjað

**Sunnudagin varð farið undir fyrsta umfar í liðkappingini í judo**

JUDO
*Jákup Mørk*

Kappast varð í Eysturskúlanum í Havn, og vóru úrslitini hesi

**Menn:**
Havnar Judofelag - Sunda Judofelag 2 - 1
**HJ:** Benny Ejdesgaard, Jákup Andreas Thomsen, Búgvi Poulsen
**SJ:** Jógvan Páll Kristiansen, Sam Vang, Petur Sigurd Johannesen

**Unglingar:**
Havnar Judofelag - Sunda Judofelag 2 - 0
**HJ:** Rúni Johannesen, Marlin Jacobsen, Jákup Andreas Thomsen
**SJ:** Jógvan Páll Kristian, Petur Sigurd Johannesen

**Dreingir:**

| | |
|---|---|
| Havnar Judofelag B - Sunda Judofelag A | 0 - 2 |
| Havnar Judofelag A - Sunda Judofelag B | 2 - 0 |
| Havnar Judofelag A - Sunda Judofelag A | 2 - 0 |
| Havnar Judofelag B - Sunda Judofelag B | 0 - 2 |
| Sunda Judofelag A - Sunda Judofelag B | 2 - 0 |
| Havnar Judofelag A - Havnar Judofelag B | 2 - 0 |

**Úrslitið í fyrsta umfarið hjá dreingjunum er sostatt soleiðis:**
1 Havnar Judofelag A
2 Sunda Judofelag A
3 Sunda Judofelag B
4 Havnar Judofelag B

**HJ A:** Ásgrímur Lutzen, Eirikur Jákupson, David Nielssen, Hanus Samró, Torvald Abrahamsen
**HJ B:** Ebba Malena Debes, Tonny á Krákusteini, Fridi E Mikkelsen, Jóannes Kári Hansen, Jákup Lutzen
**SJ A:** Regin Mørkøre, Bjørn Andeassen, Tróndur Kruse, Edvard Johannesen, Teitur Joensen
**SJ B:** Regin Mørkøre, Bjørn Andreasen, Tróndur Kruse, Edvard Johannesen